# Íslendingar misnøgdir við kvotuskipanina



*72 prosent av íslendingunum eru misnøgdir við verandi kvotuskipan*

**Bara 15 prosent av íslendingunum halda, at kvotuskipanin er tann besti hátturin at stýra fiskiskapinum**

FISKIVINNA
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Kvotuskipanin, sum stýrir íslendska fiskiskapinum, hevur ongantíð verið væl umtókt, síðani hon kom, og nú vísir ein nýggj kanning, at í dag vilja uppaftur fleiri íslendingar hava skipanina hagar, piparið grør.

Kanningin, sum Gallup hevur gjørt, vísir, at bara 15 prosent av teimum spurdu halda, at verandi kvotuskipan er tann besti hátturin at stýra fiskiskapinum uppá. Tey vóru 18 prosent fyri trimum árum síðani. Hinvegin siga heili 72 prosent, at tey eru ikki nøgd við skipanina. Fyri trimum árum síðani vóru tað 64 prosent, sum høvdu ta áskoðanina. Tey seinastu 13 prosentini eru hvørki nøgd ella ónøgd.

Kanska eitt sindur óvæntað er kvotuskipanin betur umtókt millum íslendsku menninar enn millum kvinnurnar. 21 prosent av monnunum siga hana vera í lagi, men tað halda bara 9 prosent av kvinnunum.

Sambært Morgunblaðnum vísir Gallup-kanningin eisini, at tað yngra ættarliðið er betur nøgt við kvotuskipanina enn tað eldra.

# Ringt summar á sjónum

**-Eg plagi at hava gott samband við veðurguðarnar, men í summar hevur sambandið verið stak vánaligt, sigur skiparin á norsku ferjuni Atlantic Traveller, sum siglir millum Bergen og Hanstholm**

SIGLING
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*





*Atlantic Traveller*

Finn Esben Hansen, skipari, er dani. Hann hevur siglt í skandinaviskum sjógvi í 50 ár, og hann sigur seg ikki hava upplivað so vánaligt veður á sjónum nakað summar sum í ár.

- Hetta minnir mest um vánaligt vetrarveður, sigur hann við Bergens Tidende.

Atlantic Traveller hevði ein ringan túr úr Hanstholm til Noregs í síðstu viku, og tá skipið skuldi leggja at bryggju í Bergen seinasta fríggjadag, steðgaði motorurin. Hetta var annað óhappið í summar. Tað fyrra var í juni, tá eitt vindblak sendi skipið inn í ein mola í innsiglingini í Hanstholm. Tá lá skipið eina viku til umvælingar.

Reiðaríið gevur skiparanum rætt í tí, sum hann sigur um veðrið í summar.

- Hetta svarar til, at tað var mjørki á flogvøllinum í Bergen allan juli mánað, sigur Harald Thorstensen, reiðari.

## GRANNASTUBBAR

### Ísland og Nýfunnaland størri samstarv

Myndugleikarnir í Íslandi og Nýfunnalandi fara nú at økja samstarvið millum økini. Tað bleiv avtalað á einum fundi í St. Johns í gjár millum forsætisráðharran í Nýfunnalandi og Labrador, Danny Williams, og íslendska forsætisráðharran, Geir H. Haarde. Í eini frásøgn frá fundinum stóð, at partarnir ætla at leggja dent á at økja samstarvið innan fiskivinnumál, samferðslumál, orkumál og menningarmál, og at vinnulívið skal fáa stuðul til at menna samstarvið.

### Russar aftur at kanna fisk

Russisku myndugleikarnir hava gjørt av at senda kanningarfólk til Noregs at kanna viðurskiftini hjá teimum fyritøkunum, sum selja russum fiskaúrdráttir av ymsum slagi. Talan er í høvuðsheitum um fyritøkur, sum útflyta sild, makrel, upsa og onnur fiskasløg til Russlands, skrivar Nordlys. Tann 1. januar í ár steðgaðu russar øllum fiskakeypi úr Noregi, men síðani hava tíggju norskar fyritøkur fingið góðkenning til at senda fiskavørur til Russlands. Nú skulu fleiri fyritøkur kannast.

### Á kunningarferð um kópaveiði

Í heyst fara umboð fyri politiskumyndugleikarnar í Grønlandi og onnur inuittasamfeløg á kunningarferð til Evropa í einari roynd at forða fyri, at ES skal seta fullkomið innflutningsbann ímóti kópaskinnum. Hans Enoksen, landsstýrisformaður, fer at umboða Grønland á ferðini, og hann heldur, at mong hava eina skeiva uppfatan av kópaveiðini hjá inuittum. Eitt nú halda mong, at teir sláa kóp við gassa, men so er ikki, sigur hann við grønlendska útvarpið.